Dagf. 20. august 2021
HMR j. Nr. 21/15542-2

Kaj Leo Holm Johannesen
Landsstýrismaður

Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

settur

Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismanni frá Ruth Vang, løgtingskvinnu um Skipan við føstum røktarheimslækna *Nr. 52-013/2020*

Spurningar:

1. Hvussu gongur við arbeiðinum at seta í verk skipan við føstum røktarheimslækna?
2. Nær væntar landsstýrismaðurin, at skipanin fer at virka?

Svar uppá spurning 1 og 2
Ein skipan við føstum røktarheimslækna kann skipast á ymsan hátt, og sambært Heilsutrygd ber tað til at veita eitt tilboð um røktarheimslækna undir verandi skipan.

Áðrenn farast kann undir at skipa eitt tilboð um røktarheimslækna á røktarheimum krevst, at kommunur og kommunulæknarnir, sum starvast í læknadømunum í hesum kommunum, koma ásamt um, hvussu hetta tilboð kann skipast.

Við at skipa eitt slíkt tilboð undir verandi skipan slepst undan at uppbyggja eina nýggja skipan, sum møguliga kann hava meirkostnað við sær. Hetta er eisini í samsvari við álitið, sum Trivnaðarnevndin hjá Løgtinginum gjørdi, tá uppskotið varð lagt fyri Løgtingið. Niðurstøðan hjá Trivnaðarnevndini var, at "Ein samd nevnd metir, at talan er um eitt skilagott uppskot, men vil gera vart við, at tað er altumráðandi, at tað ikki verður bygd upp ein nýggj skipan til hetta endamálið, sum ger, at uppskotið fer at hava meirkostnað við sær."

Verður tilboðið um røktarheimslækna veitt undir verandi skipan, varðveita búfólk á røktarheimum rættin til at velja egnan kommunulækna. Tað vil siga, at tey sjálvi gera av, um tey velja tann kommunulæknan, sum hoyrir til røktarheimið, ella annan kommunulækna í læknadøminum. Hesin rætturin til egið læknaval er eisini í samsvari við tað, sum dentur verður lagdur á í viðmerkingunum til "Uppskot til samtyktar um at hava fastan kommunulækna knýttan at ellis- og røktarheimum".

Av tí, at tað longu ber til at fara undir eitt tilboð við røktarheimslækna undir verandi skipan, og við atliti til niðurstøðuna hjá Trivnaðarnevndini um ikki at uppbyggja eina nýggja og dýrari skipan, hevur landsstýrismaðurin ikki gjørt meira við málið enn. Mett verður, at røktarheim/kommunur kunnu skipa eitt slíkt tilboð saman við kommunulæknunum, soleiðis at borgarar á einum røktarheimi fáa høvið at velja antin

tann kommunulæknan, sum verður knýttur at røktarheiminum, varðveita tann kommunulæknan, sum tey longu hava, ella velja annan kommunulækna.

Tórshavn, 20. august 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður